

*Oyndarfjørður bjóðar seg fram og tveir biðlarar eru. Árni Joensen, borgarstjóri, vil ikki avdúka, hvønn hann fera at velja. Hann heldur tjað vera betri fyri fólkaræðið, at eg einki sigi.*

# Oyndarfjørður er ikki til sølu

**- Bygdin er ikki á uppboðssølu hesar dagarnar, sigur borgarstjórin í Oyndarfirði. Hann vildi ikki stilla upp til kommununa, men var kroystur. Hvørki hann sjálvur ella familja atkvøddi fyri borgarstjóranum, sum nú óheftur stendur á odda fyri, at Oyndarfjarðar Kommuna fer í søguna.**

BORGARSTJÓRIN
*Øssur Winthereig*
*ossur@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Niðri í fjøruni ganga einar 40 gvaggandi hvítar dunnur, sum ikki latast um vón. Tær fylgja bara við og vísa seg fram. Um teirra næsti borgarstjóri eitur Sigurð Simonsen ella Rodmundi Nielsen leggja tær líka í.

Hvítu dunnurnar leggja heldur einki í, um tað á innara vegginum í einum gomlum neysti stendur skrivað eitt sera ljótt orð - enntá við stórum stavum.

Antin Fuglafjørður ella Runavík fáa ein bygd afturat upp í kommununa 1. januar 2005. Oyndarfjørður bjóðar ikki bara sínar 13 ferkilometrar fram, men eina bygd við dunnum, fólki og tveimum handlum.

Tað er illfýsi og kalt í Oyndafirði hendan dagin. Ikki tí. Ein av monnunum, sum gekk ein túr á keiini var bara í ein tunnum jakka og helt fyri:

- Enn er hann omanfyri null!

Politiskt er bygdin á einum slagi av nullpunkti - hon javnvigar og fólkið skal skumpa bygdina annan vegin. Teir 13 ferkilometrarnir og tær 40 gvaggandi dunnurnar skulu knýtast upp í Fuglafjørð ella upp í Runavík.

## Ikki til hægstbjóðandi

Ein av høvuðsmonnunum aftan fyri samanleggingina situr í einum smáum reyðum húsum mitt í bygdini. Í húsunum hevur sølufelagið hjá Vesturvón hildið til síðani 1995. Árni Joensen er borgarstjóri og sølumaður hjá Vesturvón, men hann vil ikki selja Oyndarfjarða Kommunu til hægst bjóðandi.

- Oyndarfjørður er ikki ein handilsvøra. Vit skulu ikki bara fokusera upp á pengar, tá vit tosa um samanlegging av kommunum. At leggja saman við eini aðrari kommunu er meiri enn pengar. Men hinvegin skulu vit sjálvandi eisini ansa eftir, at talan ikki verður um spotthandil, sigur borgarstjórin og sølumaðurin.

**- Oyndarfjørður er ikki ein handilsvøra. Vit skulu ikki bara fokusera upp á pengar, tá vit tosa um samanlegging av kommunum.**

- Hetta skal ikki vera nøkur uppboðssøla, smílist borgarstjórin, sum um hann ætlaði at leggja afturat: Tað er í arbeiðstíðini, eg fáist við uppboðssølu.

Árni Joensen hevur verið í kommununi síðani seinsta kommunuval og er ikki sørt stoltur av teimum avrikinum, sum verandi bygdaráð hevur gjørt. Vegir eru asfalteraðir, botnurin í havnini er reinsaður, brunnarnir á havnalagnum eru reinsaðir, bulverkplankar eru skiftirskift og partar av træbrúnni eru endur-nýggjaðir og ruskplássið asfalterað.

Listin yvir rokkin mál er so nógv longri.

## Varð kroystur í kommununa

Niðri á keiini gramdi ein av monnunum seg um, at gomlu gøturnar forfullu púrasta, og tað hevði hetta bygdaráðið einki gjørt við. Men hinir tríggir tóktust vera vælnøgdir við tey mál Árni Joensen og hansara felagnum i bygdaráðnum hava rokkið.

Men Árni Joensen vildi als ikki upp í politikk.

**-Hvørki eg ella familjan hjá mær atkvøddi fyri mær, men valdur varð eg kortini, so tá var bara at fara í gongd**

- Tað er eitt sindur løgið. Eg var uppstillaður, og man kann ikki siga nei, tí tað er ein borgaraskylda. Men eg vildi ikki, so hvørki eg ella familjan hjá mær atkvøddi fyri mær, men valdur varð eg kortini, so tá var bara at fara í gongd, greiður Árni Joensen frá. Hann er skipsførari og er nú uppilagstur.

Úr reyðu húsunum í Oyndarfirði hevur hann samband við fiskakeyparar túsundstals kilometrar haðani. Hvørki vegur ella tunnil er neyðugur fyri at Vesturvón skal sleppa av við veiðuna. Alt fer um internet, telefon og fax. Og um ikki so stutta tíð verður Oyndarfjørður knýttur at umheiminum um fylgisvein. Ein internetfyritøka hevur boðið bygdini samband um fylgisvein. 10 fólk hava meldað seg til, og tað var kravið fyri at fara í gongd.

## Skerdur svani

Beint uttan fyri skrivstovuna húsast ein tamur stórur hvítur svani. Hann hevur havt maka, men er nú einsamallur. Hann er skerdur so hann fer ongan veg. Oyndarfjørður hevur flog og týsdagin hevur bygdin funnið sær maka.

Niðri á keini keglast menninir um nýggi makin hjá Oyndafirði fer at verða hjálpsamur, tá okkurt gongur fyri í bygdini.

- Nei hvørki fuglfirðingar ella runvíksingar fara koma rennandi hendan-





**Elibert Joensen, fyrrv. fiskimaður**

Eg segði nei til samanlegging. Tað er skomm at leggja saman. Fólkið her í bygdini hvørvur púrasta.

Ikki vænti eg, at vit fara at fáa hjálp úr Fuglafirði ella Runavík um nakað gongur fyri.

Nei einki trúgvi eg nakar kemur úr Fuglafirði ella Runavík um ein veit typpist.

Nú tá tey hava atkvøtt fyri samanlegging, so spekuleri eg satt at siga, um eg skal fara at atkvøða týsdagin.

vegin. Nei her fer at ganga niður á bakka. Og húsini, sum nú standa tóm, vera ikki full aftur av hesum. Tvørturímóti. Fleiri fara at flyta.

**- Tað er mín vón, at vit týsdagin fáa ein greiðan meiriluta fyri aðrari kommununi.**

Ein av hinum monnunum heldur fyri í skemti, meðan tann fyrri hoyrir.

- Hatta man vera ein tann tvørasti maðurin í bygdini, so hann skalt tú ikki lurta ov nógv eftir.

Eingin av teimum torir at meta um úrslitið týsdagin.

Árni Joensen vil heldur ikki meta um úrslitið týsdagin. Han vil heldur ikki siga, hvat hann sjálvur fer at atkvøða.

- Eg eri ótrúliga glaður fyri at meirilutinfyri at leggja saman var so greiður. Eg hevði ikki havt tað gott, um bert ein atkvøða hevði verið á muni. Og tað er mín vón, at vit týsdagin eisini fáa ein greiðan meiriluta fyri aðrari kommununi.

## Fartelefonin ringdi bara eina ferð

Hann situr í sofuni á skrivstovuni. Umber seg eitt sindur fyri óruddið, sum bara eru skjøl og ymisk stikk til teldurnar. Fartelefonin hjá honum ringir bara einaferð hesa løtuni og svarið, sum ringjarin fær er:

- Eg siti á fundi í løtuni.

Løgið, sum orðini telefon og fundur hava virðing millum manna. Ringir telefonin, so verður hon tikin fram um alt. Hon vinnur á skeldi og romantiskum teski. Og svarar man fundur, so vinnur tað orðið á øllum øðrum orðum. Har verður beinanvegin virðing í hinum endanum. Ná, fundi. Umskylda - eg ringi aftur. Effektiv umbering.

Borgarstjórin dugur grundgevingar fyri báðum kommununum.

Tað talar fyri Fuglafirði, at kemur ein tunnil, so verður eingin avstandur til handils, til arbeiðspláss, til mentan og til skúlan á Kammbsdali. Harafturat hevur Fuglafjørður mark til Oyndarfjørð.

- Fuglafjarða Komnuna eigur jú hálvan fjørðin og yvir til Laská.

Hann sipar til, at Hellurnar, sum liggja yvir av Oyndarfirði í dag hoyra til Fuglafjørð.

Hinvegin er avstandurin ikki ein av bestu grundgevingum fyri Runavík. Avstandurin verður ongantíð styttri.

- Men vit hava í dag gott samband við Skálafjørðin. Fimm gentur spæla við Nes Sóknar Musikkfelag. Aðrar gentur spæla hondbólt á Skála. Og framhaldsdeildin hjá oyndfirðingum er skúlin á Strondum. Tá vegurin kom í 1968 gjørdist sambandið við Runavík tættari.

Sjálvur gekk um fjallið til Fuglafjarðar í realskúla ella sigldi við Pride í millum.



**Hallur Jacobsen, lastbilaeigari**

Eg fari at atkvøða fyri Fuglafirði, tí nú eri eg fuglfirðingur. Jú, tað verður ein stórur fyrimunur. Serliga, tá tunnilin kemur.

Sum er skulu børnini uppum við bussi. Tað kann vera vandamikið og koyrt verður í øllum veðri.

Men tunnilin er ein fyritreyt.

Eg atkvøddi eisini fyri samanlegging.



**Pauli Thomsen, fyrrv. fiskimaður**

Eg velji Fuglafjørð. Vit hava havt eitt gamalt samband við Fuglafjørð. Fyrr kendi man næstan hvønn fuglfirðing. Eg fái neyvan brúk fyri eldrabýli í Fuglafirði, men má teinkja uppá eftirkomararnar.

Einaferð kemur tunnil.

Nei tað ber ikki til at ganga í sjáldrátti, sum gjørt var fyrr.

## Ræðast Kollafjarðarsyndromið

Árni Joensen er rættuliga avgjørdur, tá hann sigur, at bæði Fuglafjarða Kommmuna og Runavíkar Kommuna hava avtalað, at samanlegging ikki skal vera ein spurningur um størstu lyftini.

- Vit ræðast Kollafjarðasyndromið. Har vóru nógv lyfti givin, men tað tykist ikki, sum kollfirðingar halda, at tey eru hildin.

**- Vit ræðast Kollafjarðarsyndromið. Har vóru nógv lyfti givin.**

Hann heldur, at fólkaræðið riggar betur, um hann ikki sigur, hvat hann vil og um kommunurnar ikki oysa stór lyfti til oyndfirðingar.

- Hvørji arbeiði nú vera gjørd í bygdini skal ikki verða høvuðsgrundgevingin.

- Eg síggi soleiðis upp á henda spurningin, at bæði Fuglafjørður og Runavík kunnu bjóða alt. So valið er sera einfalt. Hvørjum vilja borgararnir her helst vera saman við, sigur borgarstjórin.

Tá hann sigur alt, so vísir hann sjálvur á tvey øki, sum hann setur ovarliga. Dagrøkt skal skipast í kommuni, og eitt eldraabýli til eini 10-12 fólk skal byggjast. Og júst hesi bæði málini ber til fáa loyst, nú Oyndarfjørður verður partur av eini størri eind.

- Sjálvt um vit ikki skyldaðu eina krónu, so høvdu vit ikki havt ráð at bygt eitt eldrasambýli.

Hann vónar, at ein samanløgd kommuna fær eina oyndarfjarðanevnd, sum kann gera vart við seg á røttum stað, um okkurt er, sum eigur at vera gjørt.

Eisini sær hann fyri sær, at ein samanløgd kommun fær eitt slag av bygdapedelli, sum kann umvæla og viðlíkahalda í gerandisdegnum.

Nýggjasta í Oyndafirði eru grønir benkur, sum eru settir upp kring í bygdini. Har ber til at seta seg við rygginum til Fuglafjarða Kommunu og njóta flagtaktu kirkjuna í Oyndafirði ella ber til at seta seg við rygginum til bygdina og hyggja út í heim.